

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 06 - 2012

# Danski staturin missir nógvar oljumilliardir

Danskir politikarar brúka alt ov nógva orku upp á grøna orku og gloyma tær nógvu milliardirnar, sum framvegis liggja undir botninum á Norðsjónum sum olja og gass. Tað heldur í hvussu er Erling Stenby, sum er profrssari á DTU og serfrøðingur innan oljuvinnuna. Hann sigur við Børsen, at kann fara at kosta danska samfelagnum nógv, at so fáir danir fáa útbúgving innan økið, at tað nøktar ikki tørvin hjá olju- og gassídnaðinum. -Politikararnir tosa bara um ta grønu orkuna, og tað tykist løgið, tá hugsað verður um, hvussu nógvar milliardir ríkiskassin fær burtur úr oljuni um árið. Tað tykist, sum at politikararnir aftra seg við at viðurkenna, at vit forvinna nógvar milliardir burtur úr olju og gassi, sigur Erling Stenby við blaðið. Mugu finna nýggjar leiðir Danski oljuserfrøðingurin heldur, at danir kunnu fáa nógvar milliardir krónur afturat burtur úr oljuni og gassinum í Norðsjónum. Hann sigur, at ein varislig útrokning vísir, at fyri hvørt prosent, sum fæst burtur úr oljuni afturat, veksa inntøkurnar 50 milliardir krónur, og av teimum fer meginparturin í ríkiskassan. Men trupulleikin hjá statinum er, at tað eru ov fáir og nóg góðir serfrøðingar til at fáa meiri burtur úr oljuni. Erling Stenby vísir á, at sum støðan er, minkar framleiðslan í Norðsjónum, og útgerðin, sum er har úti, er ikki ævig. Tí er tørvur á at finna nýggjar leiðir, sigur hann. Martin Lidegaard, veðurlags- og orkumálaráðharri, sigur við Børsen, at hann vil sjálvandi hava so nógv burtur úr oljuni og gassinum í Norðsjónum, sum til ber. Men sum er fær hann ikki stundir til at kanna málið fyrr enn eftir summarfrítíðina, sigur hann við Børsen.